

# Tíðin bara flýgur

**Tivoliið í Aalborg, Karolinelund Park, er eitt must fyri bæði ung og tilkomin, sum vitja Aalborg. Ein ávaring, kortini. Set ein heilan dag av**













- Karolinelund Park er ein gomul og søgulig park mitt inni í Aalborg, og vit hava verið her í meiri enn 60 ár. Og her ber til hjá fólki at koma inn at hugna sær við teimum stuttleikum, vit hava at bjóða, ella tey kunnu njóta ein góðan bita í einari av okkara góðu matstovum. Ella tey kunnu koma til eina av okkara konsertum ella eitt annað av okkara mongu tiltøkum, greiðir parkleiðarin, Anders Petersen, frá.

Parkin er frá 1946, tá avgerð varð tikin um at gera økið til eitt tivoli. Tá í tíðini vóru bert stóra Tivoli í Keypmannahavn, og so tað nýggja, minna í Karelinelund Park.

- Teir heilt góðu dagarnar eitt vikuskifti í summarfrítíðini kundu tað verða eit stað millum 10.000 og 20.000 vitjandi, so tað sigur seg sjálvt, at parkin hevur verið serstakliga væl umtókt. Og tá í tíðini hevur jú heldur ikki verið so nógv annað at fara til, sigur Anders Petersen.

Upprunaliga var økið eitt venjingarstað hjá militerinum, og tað var prinsessa Karoline, sum einaferð í 1800-talinum gav hermegini staðið. Harav navnið.

Hóast Karolinelund Park Tivoli langt frá er líka stórt sum Tivoli í Keypmannahavn, so finnast bæði rutsjebanar og fríttfalls torn í parkini.

- Ja, vit hava tveir rutsjebanar, annar nevnist Boomerangen og hin Loopen. Teir báðir eru teir mest populeru saman við fríttfals torninum, og tað eru trý av teimum tingunum, sum øll heilt einfalt mugu royna, sigur Anders Petersen.

Tað sermerkta við Boomerangen – sum navnið eisini gevur eina ábending um – er, at tú koyrir úr einum enda í hin, og so bakkar tú aftur mótsattan veg.

Tá man sum eg ongantíð fyrr hevði torað at roynr ein rutsjebana, og so verður boðin ein túr sum tað fyrsta, tá vit møta parkleiðaranum, so torir tú stutt sagt ikki at siga nei takk. Men eftir fyrstu sendingina, 45 gradir ella meira, so var hetta ein fínur túrur. So góður, at vit fingu mót at royna Loopen eisini.

Men sjálvandi finnast aðrir stuttleikar, sum eru eitt sindur minni ræðandi. Har er stuttliga húsið, har eru karusellir, har eru skjótibanar, har eru tombolaspøl. Har er stutt sagt alt, sum tú kanst uppliva á einari føroyskari summarstevnu – faldað við tjúgu.

- Og so hava vit gjørt tað soleiðis seinastu árini, at tað er ókeypis atgongd. So ger tú sjálvur av, um tú vil eta ein bita, ella tú keypir tær eitt armband til okkara stuttleikar. Ella nakrar av teimum, sigur Anders Petersen.

Vit kunnu bara geva einum túri í Karolinelund Park okkara allarbestu viðmæli. Um ikki annað so at eta eina fantastiska pylsu úr tí – omnipresent – danska pylsuvogninum.